

# Misálit á Gordon Brown

At bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, ikki er serliga væl lýddur millum veljararnar hava meiningakanningar leingi víst, men hansara egnu eru heldur ikki serliga fegnir um hann. Ikki allir ið hvussu er. Tveir fyrrverandi ráðharrar í stjórn hansara, Geoff Hoon og Patricia Hewitt, hava nú sent øllum floksfeløgunum bræv, har tey mæla til, at flokkurin finnur ein annan leiðara, sum kann vinna valið næsta ár. Tey bæði mæla til eina loyniliga atkvøðugreiðslu innanhýsis í flokkinum fyri at fáa greiði á, um meirilutin styðjar tann verandi formannin ella ikki, sigur BBC.



# Missa Rituna í vár

Í samrøðuni við Vígdis Bjarnadóttir í gjár nevndi hon, at Ritan fer væntandi ikki at sigla so leingi aftrat um Nólsoyarfjørð.

Hon situr sjálv saman við øðrum og arbeiðir við at vísa á eina loysn á spurninginum, og her hava tey skilt, at Ritan bert fer at røkja hesa farleiðina nakrar mánaðir aftrat, áðrenn annað skip – Ternan - verður sett í siglingina.

Mortan Mortensen skipari hevur eisini hoyrt og lisið um hetta málið í fjølmiðlunum. Út frá hesum tykist vera greitt, at norðoyingum tørvar eitt annað skip, serliga á farleiðini millum Hvannasund og tær báðar eystastu oyggjar okkara, Fugloy og Svínoy.

- Hetta er orsøkin til, at Ritan møguliga skal har norður at sigla, greiðir skiparin frá.

Hetta førir sjálvandi við sær, at annað skip má setast inn í rutuna millum Havnina og Nólsoy. Og sum skilst verður henda ætlanin sett í verk einaferð út á vári í ár.

- Tað er ikki tí, at nólsoyingum ikki dáma Rituna. Men orsøkin er hin einfalda, at hon skal røkja hina farleiðina.

## FAKTA

**RITAN**

| | |
|---|---|
| Byggiár: | 1971 |
| Ferðafólk: | Millum 75 og 125 |
| Akfør: | 0 |
| Arbeiðsferð: | 10,5 |
| Manning: | 3 |



*- Ritan er eitt gott skip, sigur skiparin umborð, Mortan Mortensen*

# Nólsoyarleiðin í dag og í framtíðini

Sosialurin viðger í løtuni farleiðina millum Havnina og Nólsoy.

Í blaðnum í gjár høvdu vit samrøðu við eitt av ferðafólkunum, Vígdis Bjarnadóttir sum dag og dagliga ferðast um Nólsoyarfjørð.

Í dagsins blaði er samrøða við skiparan hesa vikuna, Mortan Mortensen um skipið og farleiðina.

Í komandi blaði/bløðum er ætlanin at hyggja eftir uppskoti um nýggja Nólsoyarferju, og at fáa uppspurt, hvussu ætlanin er at skipa hesa farleiðina í framtíðini.